# Sosialurin VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 9. november 2005




**Ekkó - at tora tað nýggja** (SVF)

Tey eru ung, og tey hava dirvið til at hugsa øðrvísi. Og tað eru eisini tey, sum skulu vera við til at broyta vinnumynstrið í landinum. Í løtuni eru alt ov fáir íverksetarar, tí her er ongin siðvenja at stuðla nøkrum nýggjum. Hetta var veruleikin í føroyskum vinnulívi áðrenn íløgu- og íbirtarafeløgini komu á marknaðin fyri fáum árum síðani. Men enn gongur striltið hjá nýggju íverksetarunum.

**Sunnudag 11. kl. 20.00**



**Slóðir í vatninum - søgan um Hakoah** (DR2)

Sum aftursvar til forboðið fyri at jødar kundu melda seg í eysturríkskar ítróttafeløg, bleiv jødiska ítróttafelagið Hakoah í Wien stovnað. Hetta var í 1909, tíggju ár seinni hevði felagið vunnið meistaraheitið í fótbólti og í 1930unum var felagið serliga kent fyri tveir kvinnuligar svimjarar, ið tá vóru sannar stjørnur í svimjing. 65 ár seinni hittast Hakoah-limir aftur í svimjihøllini í Wien.

**Mánadag 12. kl. 22.00**



**Falling Down** (3+ Viasat)

William situr ein morgunin í bili sínum í langari biðiröð á motorvegnum nakað uttanfyri Los Angeles. Sólin bakar niður, William er í øðini og hevur fingið nokk av tí heila. Hann fer so til gongu ígjøgnum býin. Hetta er als ikki hansara dagur, og tey fólkini, sum koma í vegin fáa av at vita. Sum dagurin líður gerst William meiri harðligari. Og nú fylgir ein løgreglumaður honum.

**Fríggjadag 9. kl. 22.15**


TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**